# Sonn listafólk

**Børnini í Reynsstovu í barnagarðinum á Hamrinum á Argjum kunnu í løtuni kalla seg verulig listafólk. Seinastu mánaðarnar hava tey gjørt eina umfatandi listaverkætlan, ið kallast 'Eg og vinir mínir'**

LIST
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Tey 19 børnini í Reynsstovu hava síðan desembur mánað teknað, málað og klipt listaverk í hópatali. Endabresturin á verkætlanini er í hesu vikuni, har listaverkini hjá børnunum verða sýnd fram í barnagarðinum.

Endamálið við verkætlanini er við skapandi virksemi at geva børnunum avbjóðingar og góða barlast við m.a. at menna hugflog, skapandi evni, sansir og rørslulæru.

– Børnini hava lært at greiða frá kenslum og hugsanum. Í mestan mun hava tey málað seg sjálvan og familjuna hjá sær. Tá tey málaðu seg, hugdu tey samstundis í spegil fyri at síggja, hvussu tey veruliga síggja út. Síðan lærdu tey, hvussu litirnir á klæðunum eita og at blanda røttu litirnar úr grundlitunum, sigur Malan Egilsson, ið dagliga arbeiðir í Reynsstovu.

Tá børnini royndu at blanda litirnar saman, vóru viðmerkingarnar m.a.: 'Waw, hetta er akkurát sum gandur' og 'Vit eru øll ymisk, men soleiðis síggi eg út'.

Í samband við verkætlanina hava børnini verið í Listaskálanum og sæð framsýningina hjá Mikines. Á henda hátt hava tey somuleiðis fingið eina fatan av, hvat myndlist veruliga er.

Í Reynsstovu lata starvsfólkini væl at verkætlanini, og børnini hava verið stak tolin og samstarvsfús:

– Eini 10 aðrar barnagarðsstovur hava eisini verið og vitjað framsýningina. Og tá hava børnini sæð, at teirra listaverk eisini hava týdning og virðing fyri onnur, og hesum eru Reynsstovubørnini sera errin og bergtikin av.

Fríggjadagin í seinastu viku høvdu børnini eina fernisering við pinnamati, víngløsum við súreplavíni o.ø., har familja, systkin, ommur og abbar komu og keyptu nøkur listaverk. Pengarnir, ið komu inn, fara børnini í næstum at brúka í býnum, tá tey fara út at eta og bowla:

– Vit hava ikki talt pengarnar enn, men hava fingið nóg mikið, leggur Malan Erlingsson at enda afturat.



*Í barnagarðsstovuni hava børnini síðan desember mánað teknað, málað og klipt listaverk í hópatali*



*Tá børnini málaðu seg sjálvan, hugdu tey samstundis í spegil fyri at síggja, hvussu tey veruliga síggja út*



*Eins og verulig listafólk, hava listaverkini hjá børnunum í Reynsstovu verið til sølu*



*Forvitnisliga framsýningin hongur uppi í barnagarðinum í dag afturat*


# Bátur til sølu



**Sierra 30 fót til sølu. Byggiár 2000. 1 ára gamal Volvo Penta 300 HK við DPH drevi, við dupultari stálskrúvu. Gongur 30 míl.**
**Báturin hevur alskyns hentleikar:**

- Bóvskrúvu
- Radara 16 fjórðingar
- GPS kortplottara
- Sjálvstýrara
- Oljufýr við klokku (Webasto)
- El-ovn til varma
- El-ovn kombineraður til spritt. 2 plátur
- Mikrobylgjuovn
- Køliskáp við frystara 12 Volt – 220 Volt
- Trykkvatnsbeholdara heitt og kalt vatn
- WC við el-tøming til septiktanga
- Brúsa til heitt og kalt vatn
- 3 stk el-lensipumpur
- El hydraulic flaprar
- El- automatic stabilisatorar
- 2 stks landstreymsløðarar
- Bjargingarbát til 6 persónar
- Gummibátur til 4 pers. Við 10 HK Honda 4-takt páhangara (óbrúktur)
- VHF Telefon
- 22' litsjónvarp 12 Volt – 220 Volt
- Flatskerm PVD 12 Volt
- Radio við fløguspælara
- El-ankar við fjarstýring – 50m keta
- 2 stk brandalarmar
- Presenning til flybridge
- Presenning til afturdekk
- Presenning runt um rútarnar og glashurð - óbrúkt
- Baðistigi til baðidekk
- Fjarstýrdur ljóskastari á targaboyla
- Nýtt avtakiligt borð til bakdekkið
- Mátta til dúrkið á bakdekkinum – óbrúkt.

**Báturin, sum er sera væl røktur, verður seldur um hóskandi boð fæst.**

**Sp/f Norðbil**
**Telefonnr. 31 37 07**